

# MB tiltak sunnukvøldið

**Árliga eydnuhjólið hjá Miðvágs Bóltfelag verður í bygdarskúlanum sunnukvøldið**

STUÐULSTILTAK

Áhugafelagið hjá Miðvágs Bóltfelag fer sunnukvøldið at skipa fyri árliga eydnuhjólinum í bygdarskúlanum í Miðvági. Ágóðin av tiltakinum fer til viðlíkahald av felagshúsinum og fótbóltsvøllinum, sigur áhugafelagið í tíðindaskrivi.

Landskendi trubadururin úr Miðvági, Sámal Ravnsfjall, fer at seta hol á tiltakið, tá hann frá klokkan 19.00 fer at syngja og spæla í ein hálvan tíma ella so. Hvør veit, um ikki onkur lokalur, sum eitt nú Húsabrekku blues, eisini verður at hoyra? Og hvør veit um ikki eisini hin um Sigmund, sum endaði í pylsuni, og tann legendariska trappan hjá Lenu vera við?

Tað er tó ikki bara við eydnuhjólið, fólk hava høvi at seta pengar til og summi at vinna okkurt afturfyri. Eisini verða lutaseðlar seldir, siga tey í áhugafelagnum. Vinningarnar har vera millum annað 500 litrar av olju, føroysk krov, lundar, sodavatn og annað, siga tey frá í tíðindaskrivinum.

Eydnuhjólkið hjá Áhugafelagnum hjá MB er vorðið eitt afturvendandi tiltak, sum í fleiri ár hevur fingið góðan stuðul frá bygdar-fólkinum, siga tey.

**ej**

# Konsert í Eysturskúlanum



*Andrea Heindriksdóttir stjórnaði ungu tónleikarunum, tá GHM vandi fyrr í vikuni*
*Mynd: Eiríkur Suni Danielsen*

**Harmoniorkestrið GHM og Rútmiska kórið í Hoydølum fara seinnapartin sunnudagin at hava konsert í Eysturskúlanum**

KONSERT
*Edvard Joensen*

Klokkan 16 sunnudagin verður konsert við fjølbroyttari skrá í auluni á Eysturskúlanum.

Harmoniorkestrið GHM og Rútmiska kórið í Hoydølum hava kastað saman til eina felags konsert fyri á tann hátt at fáa skránna so áhugaverda og fjølbroytta sum gjørligt, verður sagt í tíðindaskrivi.

Ymiskt verður eisini gjørt í sjálvari konserthøllini fyri at hugna um hjá áhoyrarunum. Høllin verður meira at líkna við eina café enn ein kosertsal, tí borð og stólar verða sett upp, eins og ymiskt verður at fáa upp í munnin, meðan konsertin er. Bæði kaffi og heimabakaðar køkur verða boðin áhoyrarunum, stendur í tíðindskrivinum.

Harmoniorkestrið GHM fer at spæla ymsan tónleik. Tað verður alt frá romantiskum og swing tónleiki til kend lagatyssi hjá Abba, Beatles og Disney.

Rútmiska kórið í Hoydølum fer at syngja bæði rútmiskan og klassiskan kórsang.

Tað eru umleið 30 næmingar í Hoydølum, sum mannað Rútmiska kórið, og kórleiðarar og venjarar eru Hans Olivur Joensen og Hans Larsen.

## Tilgongd

Harmoniorkestrið GHM er væl mannað, og nógv av fólkinum er ungt fólk, sum komið er upp í orkestrið seinnu tíðina.

Tilsamans eru umleið 40 leikarar í orkestrinum, og av teimum eru ikki færri enn 25 musikskúlanæmingar, sum byrjaðu eftir summarfrítíðina.

Í GHM fegnast tey sum vera man um tilgongdina, og minnast aftur á tíðina tá tann legendariski bretin, Hugh Watkins, í síni tíð kom við eini aldu av ungum fólki upp í GHM. Tey fólkini verða í dag roknað sum tann gamla gardan i orkestrinum. Samstundis vísir tilgongdin nú, at rættiligt lív og framgongd er í musikskúlaundirvísingini, sum er í støðugari menning, siga tey í GHM.

GHM er væl fyri, tá hugsað verður um venjarar og leiðarar. Ikki færri enn trý fólk svinga stavinum, tá vant verður. Oddur Hentze, Kenneth Jones og Andrea Heindriksdóttir. Sunnudagin verður tað Andrea Heindriksdóttir, sum fer at stjórna orkestrinum, verður sagt í tíðindaskrivinum.

# Nýtt ungdómshús í Miðvági

**Miðvágs Kommuna hevur keypt Salem frá Brøðrasamkomuni. Ætlanin er at brúka húsið til ungdómshús**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*



*Miðvágs Kommuna hevur keypt Salem frá Brøðrasamkomuni. Húsið krevur stórar ábøtur*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:** Samkomuhúsið Salem hjá Bøðrasamkomuni í Miðvági skal ætlandi byggjast um og nýtast til ungdómshús í bygdini.

Miðvágs Kommuna hevur keypt Salem frá Brøðrasamkomuni, og er ætlanin, at húsið skal hýsa teimum tiltøkum, sum fyrr hava verið i Gamla skúla og ivaleyst onkrum afturat, nú plássið gerst nógv betri, siga tey í Miðvági. Gamli skúli í Miðvági hevur verið nýttur til ymisk frítíðarítriv, men er nú umbygdur og verður nýttur til barnaansing burturav. Tí hevur verið neyðugt at hýst øðrum tiltøkum so sum telving, skótum og øðrum aðrastaðni.

At kommunan nú hevur keypt Salem fer ivaleyst at koma teimum, sum hava við slíkt frítíðarvirksemi at gera, væl við.

Eitt nú talvefelagnum, sum hevur hildið til í Arbeiðsmannafelagshúsinum í seinastuni. Har er virksemið so stórt, at plássið hevur verið ov lítið, siga tey í Miðvági.

Eisini hevur Undirhúsið onkuntíð hildið til í Gamla skúla, men er nú í MB húsinum, har tað letur til at tey trívast væl. Um Undirhúsið so eisini møguliga fer at flyta i Salem, fer tíðin at vísa, verður sagt.

Tað krevjast tó umfatandi umvælingar, áðrenn Salem kann brúkast til Ungdómshús, tí húsini eru ikki í serliga góðum standi.

Takið og vindeyguni skulu skiftast, eins og neyðugt verður at bjálva allan bygningin. Innan er húsið ein stórur salur, og ivaleyst verður neyðugt at leggja loft í, soleiðis at fleiri rúm fáast til tað ymiska virksemið, sum væntast kann í einum ungdómshúsum, har ymisk áhugamál húsast.

Parkeringsviðurskiftini eru í lagi, siga tey í Miðvági. Eini seks - sjey parkeringspláss hoyra beinleiðis til húsið. Umframt er Miðvágs Kommuna sera væl fyri við parkeringsplássum fram við høvuðsvegnum gjøgnum bygdina. Og eisini nær Salem eru rættiliga nógv parkeringspláss.



# Flutningur av brekaðum ikki nøktandi

**– Um vit høvdu egnan buss at ráða yvir, so hevði tað verið munandi lættari hjá okkum, um vit skulu útferðir við okkara búfólki, sigur Bjørg Mohr, leiðari á Eirargarði. Hon heldur eisini, at tørvurin á flutningi av brekaðum í høvuðsstaðnum als ikki er nøktandi**

SERFLUTNINGUR
*Solby A. Eliasen*



*Tað er stórur tørvur fyri bussum til flutning av teimum brekaðu í Havn*

Sum er noyðast tey á Eirargarði at ringja til Serflutningstænastuna áðrenn fríggjadag klokkan fýra, um tey hava ætlanir um at fara ein túr í vikuskiftinum. Og Serflutningstænastan koyrir ikki út um Havnina, so tað er avmarkað, hvar tey kunna fara. Herfyri segði Páll á Reynatúgvu við Sosialin, at tað eru nóg mikið av pengum játtaðir til at bíleggja buss frá Serflutningstænastuni. Men Bjørg Mohr, leiðari á Eirargarði sigur, at um Eirargarður hevði egnan buss at ráða yvir, so hevði tað lætt munandi um hjá teimum.

– Tað er sanniliga ikki altíð, at tað ber til hjá okkum at leggja ætlanir fríggjadag áðrenn klokkan fýra um, at vit skulu fara ein túr í vikuskiftinum. So ein bussur, sum vit sjálvi kunna ráða yvir hevði verið nógv betur. Og eisini høvdu vit tá kunnað farið onkra ferð út um Havnina, greiðir hon frá.

Hon er varin við at úttala seg, men hon sigur, at tað eru ikki nóg mikið av bussum til brekaði í Havnini í dag. Fyri uttan Serflutningstænastuna, so er eisini ein grønur bilur til taks, sum verður kallaður handicaptaxa, í høvuðsstaðnum, men hann ger ikki stóran mun, tá tað kemur til Eirargarð, sum hevur 15 búfólk.

– Tann taxabilurin tekur bert ein ella tveir koyristólar, so tað ber ikki til at fara við honum, um øll skulu við. So tað stutta av tí langa er, at um vit ikki hava egnan buss at ráða yvir, so noyðast vit at bíleggja buss til ferð bert her í Havn innan fríggjadag klokkan fýra, um vit skulu samlaði avstað. Og tað er ikki nøktandi, heldur Bjørg Mohr.

Og við verandi játtan eru tey ikki før fyri at keypa ein buss, so tí fóru tey í holt við at savna pening inn til ein buss sjálvi.

Bjørg Mohr sigur, at tað gongur seint við innsavningini. Tey skulu hava 400.000 krónur, men enn eru bert 140.000 krónur komnar inn. Millum annað hava tey heitt á kommunurnar kring landið um at játta eina krónur fyri hvønn íbúgva.

–Ymsir grunnar, feløg og peningastovnar, sum vit hava spurt, koma aftur við noktandi svari, tí tey meta hetta vera eina almenna uppgávu, sigur Bjørg Mohr og leggur aftur at, at tað er tað helst eisini við tað, at tey eru undir Serstovnadeildini hjá Trivnaðarmálaráðnum.

Ei heldur ber til hjá teimum at nýta tær 140.000 til útgjald og síðani skipa fyri tiltøkum til at rinda avgjøldini við, tí Eirargarður hevur ikki lov til at taka lán. So Bjørg Mohr er ikki í iva um, at ætlaði bussurin, sum tey savna pening inn til, liggur langt frammi í tíðini

# Nýggjur bussur til ruturnar í Norðoyggjum

**Týskvøldið kom ein spildurnýggjur bussur til Klaksvíkar. Tað er Sp/f Askham Bussar, sum hevur keypt nýggja bussin og nú hevur felagið so fimm bussar. Tríggjar í rutu og tveir eyka**

BUSSKOYRING
*Solby A. Eliasen*




*Hans Jon Askham koyrir nýggja bussin hjá Askham bussum millum Klaksvík og Viðareiði*

**Klaksvík:** Ein sera flottur Volvo bussur hevur koyrt millum Klaksvík og Viðareiði síðani mikudagin.

– Bussurin kom upp niðri frá mánadagin og til Klaksvíkar týsdagin, greiðir Hans Jon Askham frá. Hann og pápin, Olivar Askham, umsita alla rutukoyring, sum er í Norðoyggjum.

– Tað er ein himmalvíður munur á at koyra hendan og so tann gamla, sum nú var blivin 15 ár, sigur Hans Jon og vísir á, at í tí nýggja bussinum er alt elektroniskt stýrt.

Hans Jon greiðir frá, at tað mest er koyring við skúlabørnum. Tey hava eisini verið avbera spent til tann nýggi bussurin fór at koma. Bussurin var eitt sindur seinkaður, so tey gingu og spurdu so gott sum hvønn dag, nær tann hann fór at koma.

– Tey fara avbera væl við bussinum, tað skulu tey eiga. Men tað hevði eg eisini væntað, so spent tey hava verið, sigur bussførarin.

Fólk tosa onkuntíð um at bussarnir koyra tómir onkrar túrar. Men Hans Jon heldur ikki, at tað kann umgangast.

– Onkran túrin er bussurin tómur, men hvat skal ein gera? Tað er bara so. Tað ber ikki til ongan buss at hava bara tí hann er tómur onkrar túrar, heldur hann.

Hans Jon sigur eisini, at ein nýggjur bussur í Norðoyggjum er nakað serligt.

– Tað er ein størri hending er enn tað til dømis er í Eysturoynni, heldur hann.

Hans Jon og Olivar yvirtóku busskoyringina í Norðoyggjum fyrr í ár. Ruturnar hjá Askham bussum eru tríggjar í tali. Leið 500, sum er millum Klaksvík og Viðareiði, leið 504 millum Klaksvík og Kunoy og leið 506, sum er millum Syðradal og Trøllanes á Kalsoynni.